# Vágur sett minst 10 ár aftur í tíðina

**Nú missa 50 fólk afturat arbeiði í Vági og nú er líka illa statt við fiskaarbeiði sum tað var í ringastu kreppuárunum**

ARBEIÐSLOYSI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*– Laksavirkið í Vági kom ongantíð rættiliga ígongd og í næstu viku steðgar tað heilt og tá missa 40-50 fólk afturat arbeiði. Stjórin á virkinum væntar, at nógv fólk fer at rýma úr Vági í næstum*

Nú er aftur at kalla øskukalt í Vági.

Í hvussu so er í fiskivinnuni.

Næstan øll virkini, sum vórðu sett á stovn í Vági í kjalarvørrinum á kreppuni eru mestsum steðgað aftur.

Og í næstu viku missa eini 50 fólk afturat arbeiðið.

Tað hendir, tá ið teir verða lidnir at taka laksin, sum er í alibrúkinum. Og tá ið tað er liðugt, er heldur onki arbeiði meiri á laksavirkinum og so letur tað eisini aftur og lykilin verður snaraður.

Har hava eini 40-50 fólk arbeitt nú í nakrar mánaðir við at taka laksin, eftir at alivinnan í Suðuroynni skifti eigarar. Men tað arbeiðið verður liðugt í næstu viku og tá verða øll tey fólkini arbeiðsleys afturat.

Hvussu verður við laksavirkinum, er púra óvist.

Somuleiðis eru øll hini fiskavirkini mestsum steðgað. Á Sancy hevur ikki verið arbeiði leingi. Palm Seafood var eitt annað, hampiliga stórt virkið, og tað liggur eisini mestsum stilt.

Onnur, av teimum smáu virkjunum, eru eisini afturlatin og nú er tað bara okkurt einstakt av teimum smáu virkjunum, sum eru opin

Á Palm hava arbeitt eini 20 fólk og árini frammanundan hevur virkið tikið ímóti umleið 4. 000 tonsum um árið og meiri enn tað.

Men í fjør arbeiddu tey bara 2.000 tons. Og hvussu verður í ár, veit ongin.

Stjórin, Johannes Joensen, sigur, at Palm hevur lagt seg eftir at salta upsa til amerika.

– Men hetta seinasta hálvtannað árið er dollarin fallin eini 35% og tað hevur tikið grundarlagið undan virkinum.

– Tað forbjóðar seg sjálvt hjá okkum at virka fisk undir slíkum umstøðum, sigur hann

Teir royna nú at finna onnur fiskasløg at arbeiða og aðrar marknaðir at selja til, men hvussu tað verður, veit hann onki um. Í øllum førum veit hann, at tað tekur tíð at byggja nakað nýtt upp.

Men avleiðingin er, at tað eisini er ógvuliga smáligt við arbeiði á Palm.

## Minst 10 ár aftur í tíðina

Sostatt er støðan í fiskivinnuni í Vági líka ring nú, sum hon var í ringastu kreppuni fyrst í nítiárunum. Páll Leo, stjóri á laksavirkinum, sigur, at tá ið laksavirkið letur aftur, er aftur líka lítið fiskaarbeiðið í Vági, sum tað var í ringastu kreppuni.

Og hann væntar, at avleiðingin av tí verður ein stór fráflyting í komandi tíðum.

Ikki minst væntar hann, at tað unga fólkið rýmir.

– Vit hava havt eini 20 ung og yngri fólk til arbeiðis á laksavirkinum, men nú tað heldur uppat, og onki annað arbeiði er í eygsjón í bræði, vænti eg, at tey fleiri av teimum fara fyri at søkja sær eydnuna onkra aðrastaðni, sigur hann.

Hann leggur afturat, at hann dugir ikki at síggja nakran glotta fyri framman í Vági.

– Stóri spurningurin hjá vágbingum er nú, hvat Fiskavirking fer at gera við virkið.

Fiskavirking hevur fleiri ferðir boðað frá, at virkið skal ikki liggja stilt. Kommunan hevur eisini sett sum treyt, at virkið skal vera í gongd, annars verður leigusáttmálin um grundstykkið, sum virkið stendur á, sagdur upp og so má Fiskavirking antin taka virkið niður og flyta tað, ella selja tað.

Fiskavirking hevur eisini nýliga boðað frá í samrøðu við Sosialin, at tey standa við avtaluna við Kommuna og arbeitt verður við hvørjir møguleikar eru.

Men nær virksemið verður á virkinum, ella, hvat slag tað verður, vita tey ikki.

– Spurningurin er eisini, hvat politikararnir í oynni kunnu gera, heldur Páll Leo.

Tað skerst heldur ikki burtur, at arbeiðsloysið í syðru helvt í Suðuroy hevur verið eitt høvuðsevnið í valstríðnum uppundir løgtingsvalið í dag og allir flokkar hava havt sínar tankar um, hvat kann gerast.

Júst, hvat hevur verið ført fram um arbeiðsloysið í syðru helvt í Suðuroynni, hava vit meiri um í serliga valblaðnum sum fylgir við Sosialinum í dag.






POSITIVAR JAVNAÐARRØDDIR!



Nógvar uppgávur eru, sum skulu fáast frá hondini, áðrenn tann dagurin kemur, at støða skal takast til fullveldisspurningin. Vit hava brúkt óneyðuga nógva orku uppá at klandrast um henda spurning, og tann sum lurtar eftir valsríðnum hoyrir beinan vegin, at bæði sambandsflokkurin og tjóðveldisflokkurin trívast væl í hesari polariserin, tí tá kunnu teir vera vísir í, at einki hendir.

Vit hava snøgt sagt hvørki ráð ella tíð til allar hesar ósemjur longur. Og tí er neyðugt at Javnaðarflokkurin kemur at standa á odda fyri einari komandi samgongu, ið vil semjur heldur enn endaleysar ósemjur.

Politiskur stabilitetur, búskaparligur tryggleiki og tjóðskaparlig semja í sjálvstýrismálinum, eru tey mál sum standa ovast á mínari dagsskrá.

HELENA DAM Á NEYSTABØ

Eftir tann turbulens sum Føroya fólk hevur upplivað tey seinnu árini og serstakliga hesar seinastu mánaðirnar, er neyðugt við einum politikki, sum byggir á breiðar semjur.

Frá 1994-1998 forðaði Sambandsflokkurin øllum tosi um broytingar og menning í ríkisrættarligu støðu Føroya.
Frá 1998 til 2003 hevur Tjóðveldisflokkurin verið líka so avgjørdur í sama máli.

Henda gongd kann ikki halda fram.

Tí er brúk fyri einum sterkum javnaðarflokki nú, ið vil lurta og skapa semjur.

JAVNAÐARFLOKKURIN C

Eingi óverulig vallyfti



Tað, eg lovi veljaranum, er at fara í arbeiðsklæðini og at arbeiða við sama eldhuga, sum eg havi gjørt í fríu vinnuni í nærum 20 ár.

Eg vil arbeiða fyri:

- At vinnulívskarmarnir eru soleiðis, at so stór virðir sum møguligt verða skapt í hesum landi - vælferðini at frama.
- At íløgur verða gjørdar í at førleikamenna alt Føroya fólk.
- At stórar íløgur verða gjørdar í føroyska ungdómin, tí teirra vitan er okkara framtíð.
- At almenna umsitingin fær bestu arbeiðsumstøður, tí ein vælvirkandi almenn umsiting er fyritreytin fyri einum vælvirkandi nútíðarsamfelag.
- At mál, mentan og skúlaskapur fær høga raðfesting.
- At øll eru líka fyri lógini.
- At Føroyar gerast fullveldi.
- At Føroyar samstarva við allan heim.

E
TJÓÐVELDISFLOKKURIN
VEL FRAMTÍÐINA!

RÓI EGHOLM